# Doyði av løstunum

**Maðurin, sum doyði í arbeiðsvanlukkuni á Eiði fríggjadagin, varð slongdur av einum høgum tanga yvir á ein annan**

ARBEIÐSVANLUKKA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Politið var beinanvegin á staðnum og kannaði viðurskiftini*

Øll Eiðisbygd skalv, tá ið ein arbeiðsvanukka hendi fríggjadagin umleið klokkan 15.30.

Maðurin, sum arbeiddi saman við konu síni, hevði seinasta mánaðin fingist við at sandblása tangarnar hjá Salmon Proteins.

Henda dagin var hann farin upp á ein av teimum fyra stóru tangunum at gera eitt minni arbeiði við vinkulslíparanum fyri at fáa nakrar gamlar kneysar burtur.

Knappliga hoyrdist ein brestur, og lokið fór uppfrá. Trýstið var so mikið stórt, at maðurin slongdist upp í luftina og lendi á einum øðrum tanga nakað frá.

Politiið heldur, at maðurin er deyður beinanvegin av løstunum.

Ein maður uppi í bygdini hevur greitt politinum frá, at hann sá lokið lætta sær av tanganum, síðan sá hann eina 3-5 metra høga eldsúlu, og so kom eitt roykskýggj.

Í tanganum, sum var 500 rúmmetrar, vóru umleið 150 rúmmetrar av laksaslógvi.

Gassið skuldi ligið niðri í tanganum, men politiið gitir, at gassið hevur verið nógv í tanganum, og ein glóð hevur fest í.

**Royndur maður**

Maðurin, sum doyði, var 58 ára gamli Høgni Jacobsen, búsitandi í Saltangará og hevur havt sandblásaravirki í umleið 30 ár. Seinasta mánaðin hava hann og konan arbeitt á Eiði.

Tað var ringur standur á Eiði, tá ið vanlukkan var hend, so fleiri fólk fóru til Havnar at fáa sálarliga kreppuhjálp, og starvsfólkini hava fingið kreppuhjálp á arbeiðsplássinum.

Vanlukkan hendi, beint sum nevndin á virkinum sat á fundi inni í húsinum.

Arbeiðseftirlitið hevur verið á staðnum og kanna umstøðurnar í sambandi við vanlukkuna, men eftirlitið kann einki siga enn.

# Skerd ráðgeving í føroyskum

**- Hvør er orsøkin til, at Mentamálaráðið hevur niðurraðfest føroyskt sum frálærugrein somikið, at ongin ráðgevi er longur í starvi á Landsmiðstøðini, sum gevur góð og neyðug ráð um hesa lærugrein, ið átti at verið raðfest fram um allar aðrar?**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*


*Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, hevur sett Helenu Dam á Neystabø ein grein 52 spurning um ráðgevingina í føroyskum á Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð*

Hendan spurning vil Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, hava Helenu Dam á Neystabø at svara í einum grein 52 spurningi.

Tórbjørn Jacobsen vísir á, at leiðarin á Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð skrivar í grein á heimasíðuni hjá stovninum, at sum støðan nú er vorðin, er ráðgevingin so niðurraðfest, at hon er bara á leið ein triðingur av tí hon var í 1989.

- Nú eru fýra ráðgevar og tað sum serliga fellur í eyguni er orðingin: »Hetta merkir, at ongin ráðgevi er í eitt nú føroyskum á fólkaskúlaøkinum… Landsmiðstøðin kann tí ikki veita ta ráðgeving, sum vit kundu ynskt, og sum avgjørdur tørvur er á.«, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tórbjørn Jacobsen vísir í viðmerkingunum á týdningin, sum móðurmálið hevur fyri einhvørja tjóð – og vísir á serligu viðurskiftini í Føroyum, har danskt mál hevur so stóra ávirkan.

Hann sigur, at nú verður ráðgivið í donskum á fólkaskúlaøkinum og ikki á føroyskum á hesum sama øki.

- At niðurraðfesta tað mest unikka vit eiga, eitt av heimsins minstu málum, kann fáa vanlukkuligar avleiðingar. Trýst er á øllum smámálum í hesum altjóðagjørdu døgum, tí ræður um at dubba heldur enn at niðurlaða, sigur løgtingsmaðurin.

- Dag um dag hoyrist í almenna rúminum, at føroyska málið er farið at bekla í støðum. Fatanin er viknað, málløran kámað, bendingar og endingar hanga í leysum lofti, og skjótt kann tað fara at seta at sjálvari beinagrindini. Tí er umráðandi at politiska skipanin gevur málinum ans, og brúkar neyðugu megina til tað, at røkja og menna málið. Tað er ikki raðfestingin hjá teimum sum nú varða av politisku mentanarborgini, sambært teimum upplýsingum, sum stovnurnir undir Mentamálaráðnum varpar út frá síni heimasíðu í hesum døgum, sigur Tórbjørn Jacobsen.




Tiltak í Miðlahúsinum

Kunning um búsitingar í Judea og Samaria økinum í Miðlahúsinum í kvøld **7. september kl. 19**, við Ísrealittinum Motti Isaak

**Tiltakið er ókeypis**




FØROYABANKI